gult36 cyan36 magenta36 svart36



## TILTØK

**Elim, Søldarfjørður**
Hugnaløta fyri ung og eldri verður leygarkvøldið kl. 21. Tala við Svenning av Lofti og tónleikur við Jóannes og fleiri. Eisini verða vitnisburðir. Drekka verður aftaná.

**Ársmøti í Nesvík**
Ársmøti hjá Heimamissiónini verður 10.-13. mai í Leguhúsinum í Nesvík. Hósdagin 10. mai inngangsgudstænasta í Norðskála kirkju kl. 19.30 og sang- og vitniløta kl. 22.30 við ungum úr Havn.

**Lívsins Orð**
Barnamøti leygardagin kl. 17.30 er avlýst. Sunnudagin kl. 10.30 møti við Jóhannus Muhlig frá CMN í Danmark. Liljurnar møta mánadagin kl. 17.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsvikuskifti byrjar fríggjakvøldið kl. 20. Jógvan Petersen Klaksvík talar og Bisco syngur. Leygarkvøldið kl. 20 heldur ungdómsvikuskifti áram. Tá talar Pól Johannesen og ungar gentur úr Leirvík syngja. Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við fyrrv. trúboðaranum í Fuglafirði Bjarne Gertz Olsen. Evni: »Nær hjá Jesusi«. Felags náttúrði eftir møti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti har m.a. barnakór og húsakórið luttaka. Aftaná møti verður nátturði. Øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.
Týsdagin kl. 20 meinigheitsfundur.
Hósdagin kl. 20 ungdómsmøti við Fimmboga Poulsen.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 16.30 Alpha skeið (11-15 ár), kl. 18 møti við Fríðbjørg, Jabjørt og Jónbjørn.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Karl og Kára. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Eivind Bech og Nimrod Midjord, Ebba og Nimrod syngja. Høvi verður at geva eina gávu til Heimamissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Eingrím Holm. Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 30. apríl:*
kl. 09.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen.
kl. 10.15-18.00 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresu felagsskapin.
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin á tlf. 316491
*Týsdagin 1. mai:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Arthur Brend, Jákup Lindenskov
*Mikudagin 2. mai:*
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 16 Framsýning í smiðjuni í Lítluvík av myndum frá kvøldskúlanum í vetur, Astrid Mac Donald
*Hósdagin 3. mai:* kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 4. mai:*
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Pensionistafelagið í Havn**
kemur saman hvønt mikukvøld í Losjuni, Tinghúsvegur 18. Øll M/K sum eru fylt 60 ár eru vælkomin at gerast limir.

**Eysturoyar Gongufelag/Kunningarstova**
Gongutúrur verður sunnudagin 6. mai. Gingið verður út á Kaldbakskamb. Túrurin er miðal. Vit møtast á Oyggjarvegnum norðanfyri Mjørkadal kl. 14.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20–21 og 22.30-23.30.

**Al-anon**
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Javni**
**N. Finsensgøta 32**
Skrivstovan er á Hoydalsveg 40, 3. hædd (ovast)
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl. 10-14
Fríggjadag kl. 13-16
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail:
javni@post.olivant.fo

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373

**Giktafelag Føroya**
*MBF Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 fax 310813*
*e-mail:*
*gikt@post.olivant.fo*
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin: Tlf. 310237 týsdag frá kl. 10-12.
Ungdómsumboð: Sára, tlf. 373106. E-mail: sara@post.olivant.fo

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27. E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík**
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25, 6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C. Tlf.: 25395563 Teldupostur: ffo@post.gs www.ffo.subnet.dk

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur: fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

**Føroyingafelagið við fjørðin**
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03. Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis. Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30. Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

**Føroyingarfelagið í Aalborg**
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
E-mail: ffaalborg@mail.tele.dk
Ålaborg er opin soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00.
Álakórið venur hvønn sunnudag kl. 18.00.
Kortkvøld er annaðhvørt fríggjakvøld frá kl. 19.00
Føroyskur dansur er annaðhvørt hóskvøld kl. 19.30.
Annars vera tiltøk, ið verða á skránni, lýst í Túnatosi, sum kemur út einaferð um mánaðin.

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570.

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail: foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

## PRÓGV

Høgni Sundstein Jóanesarson, Vestmanna, hevur lokið prógv sum flogskipari. Hann hevur lært á hesum skúlum í Niðurlondum: KLM Flight Academy og RVDSW Flight Academy.

Martin Pætursson Hansen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving sum timburmaður. Lærupláss: Byggisamtakið HJT, Argir.

Kristian Mouritsen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving sum bilplátusmiður. Lærupláss: P/F Meinhardt Arge, Tórshavn.

Hallur Strøm, Trongisvágur, hevur lokið yrkisútbúgving sum bakari. Lærupláss: sp/f Sofus Dimon, Tvøroyri.

Jan Andrew Guttesen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving innan skrivstovuyrki-fyrisiting. Lærupláss: P/F Svend Krosstein, Tórshavn.

Eddie Næs Joensen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving innan smásølu. Lærupláss: P/F Balslev Timburhandil & Byggibúð, Tórshavn.

gult37 cyan37 magenta37 svart37



# Hønur í summarfrí




Føroya Egg verður ikki á marknaðinum frá 5. mai og tveir mánaðir fram, men samstundis sum eggini verða aftur á marknaðinum um hálvan juli verður byrjað uppá annað byggistig og verður tað liðugt fyrst í komandi ár. Tá verður Føroya Egg støðugt á marknaðinum.

Føroya Egg á Velbastað, sum nú hevur gott ár á baki, er nú farið undir annað byggistig, sum ger virkið ført fyri at verða á marknaðinum uttan íhald.

Síðan Føroya Egg kom á marknaðin hevur undirtøkan verið góð, og bæði keypmenn og ikki minst brúkarin eru sera glað fyri eggini. Ikki bert tí tey eru føroysk, men tí eggini eru av sera høgari góðsku og smakka sera væl og tí, at fólk vita, at hønurnar hjá Føroya Egg liva undir góðum umstøðum.

Tá nakað verður framleitt, sum hevur við djór at gera, er sera umráðandi við umstøðunum, sum djórini liva undir, og hetta er galdandi um tað er kjøtið, mjólkin ella sum í okkara føri eggini, sum verða brúkt. Eru djórini strongd ella á annan hátt liva undir vánaligum umstøðum, so gongur tað út yvir góðskuna á vøruni og hon verður ikki so góð, sum tá djórini hava tað gott. Tí hava vit, líka frá byrjan, lagt sera stóran dent á, at umstøðurnar skuldu vera so góðar sum gjørligt. Hetta hevur so eisini víst seg aftur í eini góðari vøru, sum brúkarin hevur tikið til sín og virðismetir høgt.

Fyri at halda góðskustigið javnt og gott er eggframleiðslan skipað á tann hátt, at tað eru flokkar av hønum, sum ganga saman í eitt ávíst mánaðatal, so verður flokkurin avtikin og ein nýggjur flokkur av hønum settur við. Her kemur so ein steðgur í einar tveir, tríggjar mánaðir til tær nýggju hønurnar eru búnar at verpa.

Føroya Egg byrjaði í smáum við fyrsta byggistigi, sum umfataði eina høll til eitt flokk av hønum. Hesin flokkur verður nú skiftur út, og nýggjar hønur verða settar við 11. juni. Tí verða ongi egg at fáa frá Føroya Egg í einar tveir mánaðir.

Tá føroysku eggini aftur verða at fáa, verður samstundis farið undir annað byggistig, sum umfatar eina høll afturat og tá kann Føroya Egg skipa framleiðsluna soleiðis, at tá annar flokkurin av hønum er avtikin, so verpur hin flokkurin av tí mesta. Á henda hátt kemur ongantíð steðgur í framleiðsluna, og føroyingar kunnu tá altíð fáa tey góðu føroysku eggini.

## »Eitur nakað land Week-end«

Á Gamla Meiaríinum spæla tey seinastu sýningarnar av sjónleikinum »Eitur nakað land Week-end?«, komandi vikuskiftið.

Sýningarnar um vikuskifti verða leygardagin kl. 18.00 og sunnudagin kl. 16.00.

Leikurin hjá Jóanes Nielsen hevur verið sera væl umtóktur. Síðan frumsýningina 17. mars hava yvir 3000 fólk sæð leikin.

Ummælararnir søgdu millum annað:

Frálíkar týpur í undirhaldandi, syrgiligum og beinraknum leiki. (Høgni Djurhuus, Sosialurin) Leikurin er í síni heild á altjóða støði. (Birgir Kruse, Sosialurin)

Føroysk framleiðsla til UG frá fyrst til síðst. (Sjúrður Skaale, Fregnir)

Ein leikur sum øll sum hava áhuga fyri tí føroyska samfelagnum í dag áttu at farið til (Carl Johan Jensen, Basalt)


**Keyp myndir**

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum




Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:
10x15 cm. kr. 80,- 18x24 cm. kr. 150,-
13x18 cm. kr. 100,- 20x30 cm. kr. 200,-
15x21 cm. kr. 130,- 30x45 cm. kr. 350,-

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.: ____
Síða: ____
Stødd: ____
Mongd: ____

Navn: ____
Bústaður: ____
____
Telefon: ____





